# EB/Streymur hevur eingi mál við Løkin

| | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| ÍF-VB | - | 1-0 | - | - | - | - | 1-2 | 2-5 | 0-3 | 0-0 | - | 1-1-3 | 4-10 |
| KÍ-Skála | 0-2 | 1-1 | 7-0 | 4-0 | - | - | - | - | - | - | - | 2-1-1 | 12-3 |
| HB-GÍ | 3-1 | 3-3 | 2-2 | 3-0 | 2-3 | 5-0 | 2-0 | 3-0 | 2-0 | 3-2 | 0-0 | 7-3-1 | 28-11 |
| NSÍ-EB/S | - | 1-0 | 3-0 | 4-0 | 1-0 | - | - | - | - | - | - | 4-0-0 | 9-0 |
| TB-B36 | 0-0 | - | - | 2-8 | - | - | - | 1-1 | - | 0-3 | 3-2 | 1-2-2 | 6-14 |

Tá tosast skal um hagtølini undan dystunum um vikuskiftið, so skerst illa burtur, at NSÍ má roknast sum størsti favoritturin. Í fýra dystum, har EB/Streymur hevur vitjað við Løkin, hevur NSÍ vunnið hvørja ferð, og enn hevur EB/Streymur fyrsta málið til góðar á vøllinum.

Í aðrar mátar hevur HB heilt greitt hagtølini við sær, tá talan er um heimadystir móti GÍ. Her hevur GÍ bara eina ferð vunnið seinastu tíggju árini.

Í hinum trimum dystunum er talan um javnar uppgerðir í so máta. VB hevur tó havt takið á ÍF, hóast seinasti dysturin liggur seks ár afturi. Á Tvøroyri hevur B36 ikki tapt móti TB síðani '95, og í Klaksvík hevur KÍ munin á Skála, sum tó vann fyrru uppgerðina við Djúpumýri í ár.

Hagtølini avgera tó ongan dyst, men stuttlig kunnu tey kortini vera at hyggja at.

## formuladeildin

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Skála | 21 | 12 - 7 - 2 | 48 | 23 | 25 | 43 |
| 2 B36 | 21 | 11 - 7 - 3 | 29 | 12 | 17 | 40 |
| 3 HB | 21 | 12 - 3 - 6 | 55 | 28 | 27 | 39 |
| 4 NSÍ | 21 | 10 - 7 - 4 | 35 | 27 | 8 | 37 |
| 5 EB/Streymur | 21 | 8 - 9 - 4 | 33 | 28 | 5 | 33 |
| 6 GÍ | 21 | 6 - 4 - 11 | 28 | 37 | -9 | 22 |
| 7 KÍ | 21 | 6 - 2 - 13 | 29 | 41 | -12 | 20 |
| 8 ÍF | 21 | 5 - 5 - 11 | 24 | 48 | -24 | 20 |
| 9 VB | 21 | 5 - 4 - 12 | 26 | 43 | -17 | 19 |
| 10 TB | 21 | 3 - 6 - 12 | 21 | 41 | -20 | 15 |

**2. deild menn**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B71 | 12 | 10 - 1 - 1 | 44 | 7 | 37 | 31 |
| 2 B68 | 12 | 10 - 1 - 1 | 43 | 10 | 33 | 31 |
| 3 FSV04 | 12 | 8 - 1 - 3 | 36 | 11 | 25 | 25 |
| 4 AB | 12 | 7 - 2 - 3 | 28 | 22 | 6 | 23 |
| 5 HB | 12 | 6 - 1 - 5 | 32 | 25 | 7 | 19 |
| 6 LÍF | 12 | 4 - 1 - 7 | 35 | 35 | 0 | 13 |
| 7 Sumba | 12 | 4 - 1 - 7 | 27 | 40 | -13 | 13 |
| 8 Royn | 12 | 3 - 1 - 8 | 13 | 44 | -31 | 10 |
| 9 B36 | 12 | 2 - 2 - 8 | 11 | 31 | -20 | 8 |
| 10 GÍ | 12 | 0 - 1 - 11 | 12 | 56 | -44 | 1 |

ÍF-VB:

# Nógv stendur upp á spæl í Fuglafirði



**Manningarliga stendur so væl til, sum tað ber til, hjá ÍF og VB, sum bæði við sigri kunnu skapa sær rættuligan glotta í botnstríðnum**

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Tað eru tvey lið, sum hava knívin á barkanum, sum seinnapartin í morgin fara á vøllin í Fuglafirði.

Felags fyri tey er, at úrtøkan nógvu tey seinastu umførini ikki hevur verið nakað serlig. Tað ber við sær, at báðir partar stríðast fyri at sleppa undan aftastu plássunum. Og tað kann væl fara at vísa seg, at ein møguligur vinnari í Fuglafirði í morgin fer at fáa ein orduligan lætta. Hesi bæði liðini kappast við TB og KÍ fyri at sleppa undan aftastu sessunum, og tað er kanska ikki serliga sannlíkt, at hesi bæði, sum skulu spæla á heimavølli móti ávikavíst B36 og Skála, fara at fáa so nógv burturúr. Í hvussu so er ikki, um roknað verður út frá støðutalvuni.

Hjá ÍF var talan um stórt vónbrot, tá ið teir fyri tveimum vikum síðani í evstu løtu mistu eitt stig á Skála. Fuglfirðingar hava ikki givið skarvin yvir. Teir hava ikki havt spælarar burturfrá í landsliðsøringdum, og teir siga seg næstan vera so væl fyri við fólki, sum tað ber til. Í hvussu so er hava teir ikki verið manningarliga so væl fyri leingi, sum teir nú tykjast at vera.

Einasti, sum ikki er tøkur, er Gunnar Nielsen. Tað ber honum ikki til at venja við fullari ferð. Hann vitjar støðugt hjá fysioterapeuti, men tað hevur víst seg at ganga illa at sleppa av við búkskaðan.

- Lagið hevur verið gott undir venjingunum, og vit eru greiðir yvir, at talan móti VB verður um rættuliga lyklauppgerð. Vónandi fer hetta at síggjast aftur í avrikinum á vøllinum, verður sagt úr Fuglafirði.

Stigatalvan boðar frá, at støðan í Vági ikki er nakað serlig. VB hevur fingið eitt stig í fýra teimum seinastu royndunum. Málmunurin í hesum dystunum er 3-13!

Vágbingar plaga ofta at standa seg væl í Eysturoy. Síðsta dømið um hetta var, tá ið teir fyri trimum vikum síðani megnaðu 1-1 í Gøtu. Fyrr í ár hava teir vunnið á Skála.

Í Vági hevur verið soltið við fólki seinnapartin av árinum. Positiva søgan úr Vági er, at allir eru tøkir. Eingin er leikbannaður, og eingin er skaddur.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

ÚTBJÓÐING

Landsvegur Skála – Strendur, 4. stig

Við hesum verður 4. stig av arbeiðinum at gera landsveg millum Skála og Strendur boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið verður boðið út í høvuðsarbeiðstøku og fevnir um gerð av 10 m breiðum landsvegi, frá Hulki og norður til Prestá, umleið 1350 m, herundir gerð av betongbrúgv um Stóruglyvur.

Arbeiðið skal vera liðugt í seinasta lagi 24. juli 2006.

Lisitatiónin verður á Landsverki týsdagin 27. september 2005, kl. 10.00.

Ástaðarfundur verður mikudagin 21. september 2005, kl. 10.00.

Útbjóðingartilfarið verður at bíleggja hjá:

sc@lv.fo
Telefon: 540 857

Tilfarið verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 5.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 9181-134.228.4 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo
LANDSVERK byggir land